# Falskar ákærur móti Dollanum í Congo

**Vit fara nú at halda áfram við røðini um Daniel J Danielsen, sum var trúboðari í Congo 1901-1903 og síðan í Føroyum frá 1904 og til sín deyða í 1916.**

**Vit hava longu havt tríggar partar í Miðvikuni og ein part í Hendur ið Sleptu, sum alt vísir ein heilt serligan persón, sum var við til at skapa heimssøgu fyri 100 árum síðan**



Óli Jacobsen
olij@sosialurin.fo

Daniel Jacob, vanliga kallaður Dollin, var føddur í 1871, sonur eina einliga mammu, sum neyvan hevur verið heilt lætt tá í tíðini. Hann fær ein buldrasligan ungdóm men verður so radikalt umvendur í Glasgow. Hann kemur til Congo at virka fyri Congo Balolo Mission, har hann fær teknisku ábyrgdina av trimum av teimum sjey skipunum hjá missiónini. Hann var útbúgvin maskinmeistari.

Hansara søguligi innsatsur verður tó, tá ið hann gerst fremsti hjálparmaður hjá bretska konslinum Roger Casement á hansara kanningarferð fram við Congoánni í 1903. Endamálið var at kanna og staðfesta teir ræðuleikar, sum vóru framdir av umsitingini hjá Leopold kongi í Belgia, sum hevði Congo sum sína persónligu ogn. Hendan ferðin gjørdist byrjanin til endan hjá konginum, sum í 1908 mátti lata Congo frá sær.

Komin aftur til Bretlands heldur Dollin á við hesum virki fyri teimum kúgaðu í Congo, og hann gerst ein av teimum í fremstu røð at byrja ta fólkarørslu, sum eisini er ein partur av hesi søgu, og sum nærri verður komið inn á í komandi parti.

Øll stór menniskju hava sínar veikleikar. Tann hjá Dollanum var hansara sinni, sum eisini gav honum samstarvstrupulleikar við sínar egnu. Men hansara virksemi gjørdi hann eisini óynsktan av myndugleikunum í Congo, og tí kom hann til Føroyar at virka.




*Lina og Dollin á yngri árum*

## Hava fingið tilfar úr skjalasøvnum

Vit hava fingið ein hóp av tilfari afturat, sum lýsir lívið hjá Dollanum. Tað er nóg mikið til fýra partar afturat teimum trimum, sum vit hava havt.

Hetta tilfar er fingið úr ymiskum skjalasøvnum í Bretlandi. At hetta hevur latið seg gera er takkað verið beinasemi hjá fleiri, sum heitt hevur verið á.

Ein av teimum er David Isaacson. Hann er ein ungur ortodoksur jødi í London, sum eg hitti fyri nøkrum árum síðani í Svínoy og havi havt samband við síðan. Hann hevur á skjalasavnið í London funnið sera áhugavert tilfar, brævaskifti og greinir, í skjalasavninum hjá Edmund Morel, sum stóð á odda í stríðinum móti belgiska konginum Leopold í Europa og í USA. Hetta tilfar er grundarlagið fyri komandi parti í hesi røð.

Sámal Mikkelsen úr Klaksvík lesur gudfrøði í Glasgow. Hann gjørdu sær tann ómak somu viku, sum hann skuldi giftast, at fara til Edinburgh og leita eftir tilfari úr skjalasavninum hjá Balolo missiónini, sum Dollin virkaði fyri, og sum er grundarlag fyri hesum parti. Alt hetta tilfar merkir, at vit kunnu betur útgreina tað, sum er skrivað í fyrstu pørtunum.

Echoes of Service er eitt gamalt missiónsblað, har Dollin skrivaði nógvar frásagnir frá sínum virksemi í Føroyum. Hetta er eisini sera áhugavert tilfar. Jane Cox, sum arbeiðir á blaðnum, gjørdi sær tann ómak at blaða alla árgangir frá 1904-1916 ígjøgnum, og hon tók kopi av øllum greinunum og sendi okkum tær.

Alt hetta hevur gjørt sítt til, at vit kunnu bera hesa sera áhugaverdu og nærum ókendu søgu um havnarmannin, sum var í fremstu røð í heiminum í teirri rørslu, sum tá stríddist móti harðræði og fyri mannarættindum. Vit takka øllum, sum hava givið sítt íkast.

Vit hava eisini ráðført okkum við norðmannin Espen Wæhle, sum er ein tann fremsti Congoserfrøðingur í Norðanlondum. Hitti hann í seinasta viku, og hann var ovfarin og fegin um alt tað tilfar, sum er fingið til vega um Dollan, og sum kemur at seta hann sum ein týdningarmiklan part av søguni hjá skandinavum í Congo. Hann metir, at henda frásøgnin týdd til enskt kundi havt stóran áhuga úti í heimi.

Tað eru framvegis leysir endar, sum Espen framhaldandi fer at royna at fáa greiðu á.

Í hesum partinum fara vit at greiða frá teimum trupulleikum, sum Dollin fekk í Congo. Fyrst og fremst av følskum ákærum um, at hann skuldi havt nýtt somu mannagongd móti teimum innføddu, sum valdsharrarnir nýttu, og síðan um stríðið fyri at koma aftur til Congo at virka.

Í 5. parti verður greitt frá tí sambandi sum Dollin hevði við Edmund Morel, eftir at hann var komin aftur til Bretlands. Greitt verður frá teimum fundum, sum hann hevði í Bretlandi og greinum, hann skrivaði í bløðunum.



*Harley House í London var missiónsskúlin hjá Balolo missiónini. Her var Dollin eitt ár, áðrenn hann fór til Congo. Her búði hann aftaná heimkomuna, tá ið hann var í London, og her hevði stýrið fyri Balolomissiónini sínar fundir*